# Skemt



# Umsíðir bragdað

FÓTBÓLTUR Tað hevur verið lítið um Kyndil se
men umsíðir eydnaðist at skava nøkur stig sar

Uni Holm Johannesen

Kyndil hevði ikki vunnið í seinastu 10 landskappingardystunum undan vitjanini í Vestmanna í gjár. Seinasta, Kyndil fekk fult, var tann 15. januar, tá botnliðið StÍF vitjaði í høllini á Hálsi.

Nú bragdaði aftur. Kyndils-

í ítróttarhøllini í Vestmanna í gjár. Úrslitið var 23-20.

**Einki at spæla fyri**

Dysturin var javnur allatíðina. Tað var ikki fyrr enn seinastu minuttirnar, at Kyndil fór framum og fekk eina leiðslu, sum heimaliðið ikki kláraði at hótta.

## Nýtt fótbóltsfelag

Sosialurin avdúkaði í farnu viku, at eitt nýtt fótbóltsfelag ger um seg í Føroyum. Tað er felagið Kyndil, sum annars er kent frá hondbóltinum. Sambært greinaheitinum í Sosialinum, er Kyndil nú farið at skava sær stig saman í fótbóltskappingini. Um teir framvegis kasta bóltarnar, ella um teir veruliga sparka, sigur søgan einki um.



## Slepp!

Ja, tað kann væl verða at, at hesin amerikanski fótbóltsspælarin verður steðgaður, men um eina lítla løtu fær hann eitt ordiligt yvirraskilsi.



## Gávan

- Konan segði við meg, at hon skuldi ikki hava nakra føðingardagsgávu í ár, men hon helt, at vit heldur skuldu gera okkurt annað saman.
- Gjørdu so tit tað?
- Ja, vit skeldaðust um, hví eg ikki hevði keypt henni nakra føðingardagsgávu.

## Maðurin og vaskiklæði

Ein maður, sum sendi skitin klæði hjá sær á eitt vaskarí, setti ein pappírslepa á skjúrtuflippuna, har hann skrivaði "brúka meira sápu her". Tá hann fekk klæðini aftur, var ein pappírslepi í nývaskaðu undirbuksunum. Har stóð "brúka meira pappír her".

## Í RANGASTRÚPAN

**Finala nummar 56?**
Caroline Wozniacki skal nú møta Elena Vesnina í finaluni, sum er nummar 56 á heimsstyrkislistanum
*Portal.fo*

**Nýggjur Disney-figurur**
Sum nakað heilt serligt koma Disneyfigurarnir Mickey og Minnie Mouse, Fedemule og Pluto á vitjan
*portal.fo*

**Neyvan í einstaklingakapping**
Liðið hjá Boga vann FM í bridge fyri lið
*Kringvarp.fo*

**Hvat?**
trupul¬leikin er so mikið stórur, at nú er avgjørt hava gjørt ímillum løgregl¬una og Dátueftirlitið
*Sosialurin*

**Langan kaðal**
Breiðband til havs
*Sosialurin*

**Seglloftinum ella?**
Framsýning: Annika á Lofti á Tvøroyri
*Kringvarp.fo*

**Hvat er tað millum vinir**
Brúktu bara 10 milliónir ov nógv
*portal.fo*

**Ring eftir læknanum!**
Hann hevur ein mann í rygginum
*Suni Merkistein undir fótbóltsfrásøgn*

**Hon kann alt!**
Wozniacki er flúgvandi
*Dimma*

**Upp og niður í hálvan tíma**
TB koppaði øllum á høvdið í ein hálvan tíma
*Portal.fo*

**Ruddið forsíðuna**
Føroyingar í Odense
*Portal.fo*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Meteorologinørdar

Tá eg gekk í Nonnuskúlanum í myrkastu miðøldini, fingu vit at vita, soleiðis, at tað kundi á ongan hátt misfatast, at tann, sum vágaði sær at broyta eitt einasta orð av Guds orðum, var glatað/ur í allar ævir í gráti og tannagrísli í minst sjey ævinleikar.

Verri hóttan kundi tú ikki geva einum góðtrúnum og naivum barni. Men soleiðis var katólska námsfrøðin tá og er ivaleyst enn.

Hetta er meira enn hálv øld síðani, men hóttanin situr í mær enn. So nógv, at eg hvakk við, græt og gríslaði tenn, tá eg las, at nú skal ævigi sannleikin umsetast av nýggjum til føroyskt. Men tað var ikki júst søgan tann svarta dag. Søgan var og er, at eingin kvinna er biðin. Jú, kanska til rættlestur. Rættlestur, rættlestur, bølaniða, dupultur grátur og dupult tannagrísl.

Eina ferð skilti Gud ikki føroyskt, segði fanin danin. Hann hevur ongantíð skilt kvinnuna.

Hann, sigi eg, tí sum skilið er í verðini, er eingin ivi um, at Gud er ein maður, hóast tær í reyðum hosum í Danmark fóru at kalla hann Gudrun fyri 40 árum síðani ella søgdu so hart, at øll hoyrdu: tað er ikki hennara vilji. Gud, nei, hon vil ikki, at menn ráða.

Nei, tíverri er Gud ikki ein kvinna. So var annað skil. Men tað fáa vit so einki gjørt við. Teir, sum uppfunna Gud og eiga patentið, góðtaka ikki eitt kynsskifti.

Um Veðurgud vil.

Nørdar eru, sum hava biðið Smyril Line siga sær fá, tá útlit eru fyri einari illveðursferð. Hesir nørdar savna tær upplivingar, sum tað er at vera um borð á einum ferðamannaskipi í ódn og ringum sjógvi.

Nú føroyska ferðavinnan framvegis er har, sum hon altíð hevur verið, er ein møgulig ferðafólkafella at selja veðrið í Føroyum.

Nørdar eru eisini, sum vilja vitja øll heimsins lond, har veðrið altíð er ringt. Vit kunnu til dømis selja vindin í Føroyum. 20 metrar um sekundið fyri 2000 kr. um dagin, 25 metrar fyri 2500 kr. og so framvegis. Tá vindferðin ongantíð fer niður um 15 metrar um sekundið, er hetta ein funnin veðurhani, nú ferðavinnan ikki kann finna nakað annað eftir at hava leitað so leingi í bølamyrkri.

Ivaleyst eru meteorologinørdar har úti, sum vilja gjalda nógv fyri at uppliva illveður, eisini eftir handan stuttliga dagin, sum eitur summarmáli.

Luftholini yvir Sørvágsfirði kunnu eisini seljast í metramáli, 1000 krónur fyri meturin. Um Veðurgud vil.

Nú vit eru uppi har, so eru longu halarnir í nógvum floghavnum fluttir. Teir eru fluttir frá check in til baggage drop. Ikki ber til at skriva seg inn við eina skivu sum fyrr. Tað skal gerast í einari maskinu, sum krevur størri tøkniligan førleika enn mín og nervar av øðrum málmi enn mínar eru gjørdar úr. Hví hetta er broytt, veit eg ikki. Eg tími heldur ikki at spyrja. Men halin er fluttur. Fyrr skuldi tú bíða eftir at sleppa at skriva teg inn og sleppa av við kuffertið í senn. Nú skalt tú bíða líka leingi fyri at sleppa av við kuffertið. Spyr ikki meg.

Men várið er. Týsdagin sá eg bæði smálomb og gásarungar. Nú bíði eg eftir dunnuungunum. Tað gera likkurnar tíverri eisini. Tær hava longu sett seg á strategiskum steinum við ánna. Gott tol hava tær, betri enn ketta.

Páskaliljan er ein hugtakandi blóma. Hon kennir álmanakkan. Hóast páskirnar í ár eru nógv seinni enn tær plaga at vera, eru páskaliljurnar ikki følnaðar. Tær bíða so penar og afturlatnar eftir hátíðini. Men páskaeggini eru helst stropað nú.

Kvinnur, verið glaðar fyri, at tit ikki verða bidnar til at umseta tóm orð. Og hann, hann rísur.